# Kjak



Ingvard Fjallstein

## Hugleiðingar um grøna orku

**- røða á mentunarvikuni í Sunda Kommunu í 2010**

Seinni partur av røðuni hugleiðir um aðrar orkumøguleikar í Føroyum, orkustøðuna í Føroyum og spurningur verður settur við, um ætlaðu útbyggingarnar er tað besta, ið fáast kann fyri 3 milliardir.

### Aðrir orkumøguleikar

Eg havi nevnt, at orka úr vatni og vindi er grøn við nakað væl av gráum ísletti. Myllur, sum framleiða streym úr streymi, elektriskan streym úr sjóavarfalsstreymi, eru kanska grønari. Tað tykist at liggja millum reglurnar í verkætlanarlýsingini. Tær síggjast jú ikki. Vit menniskju síggja tær jú ikki. Hvørja ávirkan eitt stórt tal av sjóvarfalsmyllum fer at hava á streymviðurskifti, djóralív og umhvørvi á føroysku firðunum, dugi eg ikki at meta um. Men sjálvandi hevur tað sína ávirkan. Ein fyrimunur við sjóvarfalsorku fram um vatnorku og vindorku er, at tað ber til at spáa um sveiggini í framleiðsluni fyri alla framtíð. Men sveiggini gera eisini, at vit skulu hava fleirfaldan framleiðslumátt fyri at fáa javna framleiðslu, og tað dýrkar.

Hvat við orku úr sólarljósi, kann hon gera nakra mun í Føroyum? Ella orka úr aldunum, sum vit hava í føroyskum sjóøki viðhvørt, men ikki altíð? Hvat við vatnorku úr Íslandi ella atomorku? Øll hesi eru grøn upp á tann mátan, at tey ikki lata $CO_2$ frá sær av týdningi, meðan tey framleiða orku.

Orka frá biogassi ella spritti, sum er vunnin úr lívrunnum evnum, sum matleivdum, tøðum og tara, verður mett at vera grøn, hóast útlát av $CO_2$. Orka frá brenning av timbri og líknandi somuleiðis. Tað kemur av, at hetta $CO_2$ið verður mett at vera ein partur av ringrásini hjá $CO_2$ í nútíðar náttúru. $CO_2$ið varð fyrst bundið til lívrunnað tilfarið, meðan tað vaks, og verður so leyslatið aftur, tá tilfarið verður niðurbrotið ella brent.

### Føroyska orkustøðan

Góðu fundarfólk! Nú eri eg komin hartil í hugleiðingunum um orku, sum er so tekniskt og umfatandi og fløkt, at eg kenni meg sum Jákup Sibba. Eg kenni ikki S fyri K. Tað er eisini trupult í eini røðu, at greiða frá so nógvum tølum og tekniskum hugtøkum. Men eg geri eina stutta roynd.

Vit føroyingar brúka eini 225.000 tons av olju um árið til saman. Hetta svarar til umleið 2.600.000 MWh (megawatttímar) um árið. Fiskiskip, onnur skip og flogfør brúka aðra helvtina, meðan vit á landi brúka hina helvtina til upphiting, ljós og flutning.

Harafturat framleiða vit orku úr vatni og vindi. Higartil hevur framleiðslan úr vatni ligið um 100.000 MWh um árið og úr vindi um 12.000 MWh um árið. Tað merkir, at orka úr vatni seinastu árini hevur snarað um 3-4 % av samlaðu orkunýtsluni í Føroyum, og orka úr vindi ríður um tað hálva prosentið. Hesi 4-5% svara til ein triðing av elframleiðsluni í Føroyum. Tveir triðingar verða framleiddir við olju, tungolju. Hon er bíligari, men hon dálkar eisini meira. Ætlanir eru um, at lutfallið skal vera umvent; tveir triðingar úr vatni og vindi ella meira.

Tað eru í høvuðsheitum tvær grundgevingar fyri at byggja vatnorkuna út. Tann fyrra er at gera okkum leysari av olju sum orkukeldu, og hin seinna er at minka um útlátið av $CO_2$. Ella var tað øvugt fyri einum ári síðani?

Ætlanir eru um at byggja vatnorkuna út við Víkavatn (frá Langasandi til Tjørnuvíkar, norður í Sjeyndir og yvir til Saksunar), í Saksunardali, við Fjallavatn, við Tíggjará, í Árnafirði, í Fámjin og í Botni. Hetta kemur sjálvandi afturat útbyggingingini, sum er í gongdi frá Norðskála til Selatraðar. Hesar útbyggingar fara at økja elframleiðsluna til 220.000 MWh um árið. Í tíðarskeiðinum meðan tað verður bygt út, økist vanliga elnýtslan kanska til 300.000 MWh. Kann vindorkan tá framleiða 30.000 MWh um árið, verður framvegis neyðugt at framleiða 50.000 MWh við tungolju, svarandi til eini 10.000 tons.

Mett verður, at tað fer at kosta slakar 3 milliardir krónur at gera hesar útbyggingarnar og harvið at økja vatnorkupartin av samlaðu orkunýtsluni frá 3-4% til ein 7-8%. Útlátið av $CO_2$ minkar við 8%. Tríggjar milliardir eru ikki smápengar í einum landi við eini fíggjarlóg upp á góðar 4 milliardir krónur og 800 mió krónum í halli.

### Var hetta tað besta?

Góðu fundarfólk. Ein áhugaverdur spurningur um eini 10-15 ár, tá vit hava brúkt einar 3-4 milliardir krónur, og sita eftir við einum sera viðtikinum umhvørvið, er, um Føroyar eru meira ella minni tengdar at oljuni, um vit mangla brúkbara orku til 90% av orkutørvinum ella 95% av orkutørvinum?

Tá fara vit at spyrja okkum sjálvi, um hesar íløgurnar í vatnorku fyri 3-4 milliardir krónur vóru tað besta, sum kundi gerast, fyri at fáa eina 5% betri støðu í eini frammanundan vánaligari støðu? Vóru íløgur í vatnorku fyri 3-4 milliardir krónur besti háttur at minka útlátið av veðurlagsgassum við eini 8-10%? Vóru hesar 3-4 milliardir krónurnar í vatnorku tað besta fyri náttúruna, fyri umhvørvið, fyri ferðavinnuna, fyri fólkið í Sunda kommunu, fyri fólkið í Føroyum, fyri Føroyar og fyri Heimin? Tað eru teir orkukrevjandi spurningarnir!

Fyri mær snýr tað seg kanska ov nógv um kenslur. Kenslum fyri ljósi og ljóðum, fyri litum og skapum, fyri vatni og lendi, fyri livandi og lívleysum, fyri at liva og ikki at liva.

Tí bleiv eg bæði illur og máttleysur ein summarmorgun herfyri, tá stjórin í okkara elfelag tosaði um bygging av orkuverkið við Víkarvatni Útvarpsins morgunsending. Eg má bara biðja um umbering beinan vegin fyri, at eg nú verið eitt sindur persónligur. Tað ljóðaði so lætt og einfalt og sjálvsagt og hevði einki upp á seg. We do it the american way. Teir skrúva Niagara Falls frá og fyri, tá tað er hóskandi. Og so vil okkara elfelag hava dialog, samrøður, samskifti um útbyggingina av vatnorkuni í Norðurstreymoy. Tað ljóðar gott, tí tað hevur verið tøgn um útbyggingarnar av vatnorku í ov langa tíð.

Men samrøður við hvønn? Eitt prát við býráðið í Sunda kommunu, og ætlanir um kunning av borgarunum norðuri í Vík! Alt gott um tað, men hvussu smátt kann tað vera?

Tað snýr seg ikki um at skrúva fossin í Fossá frá ella fyri, tá ein bussur við ferðafólki kemur framvið. Føroyski orkutørvurin og føroyska náttúran viðvíkja øllum føroyingum. Tað ber ikki til at blíva við at leggja lutir í eitt putlispæl, har tú ikki kennir tað liðnu myndina. Tí skulu nógv onnur góð fólk upp í leikin. Vinnumálaráðharrin, umhvørvismálaráðharrin, løgtingið, serfrøðingar hjá SEV, serfrøðingar hjá Røkt, uttanveltaðir orkufrøðingar, umhvørvisfrøðingar, samfelagsfrøðingar, samskiftisfrøðingar, áhugafelagsskapir og helst onnur við.

Vit mugu fáa greiðu á, hvør er tann tryggasta, besta og bíligasta orkuloysnin fyri Føroyar? Ikki eina loysn fyri tey 15% av føroyska orkutørvinum, men øllum orkutørvinum. Brúkið eitt ár ella tvey og nakrar milliónir krónir upp á tað. Og hetta er líka nógv ein áheitan til landsins mynduleikar, sum til okkara orkufelag. Íløgan kostar hóast alt nógvar milliardir! Tað skaðar ikki at hugsa stórt. Tað er ikki altíð, at smátt er gott. Komið við eini samlaðari niðurstøðu um orkustøðu Føroya og skilagóðum og burðardyggum loysnum. Breiðið tær út fyri okkum øllum - fólkinum í Føroyum.

**Takk fyri at tit góvu mær ljóð og lýddu á!**



Heðin Mortensen
*borgarstjóri*

## Tað gongur eftir ætlan við Boðanesheiminum, Jóna

Jóna Mortensen hevur í bløðunum enn einaferð vavt alt saman, hvussu ábyrgdin viðvíkjandi eldrarøkt og røktarheimum her á landi er skrúvað saman.

Í grein leggur hon eftir Tórshavnar kommunu fyri at hava sovið í tímanum, tí at kommunan einki røktarheim hevur at bjóða teimum, sum ikki hava pláss í dag.

Vit kunnu skjótt verða samd um, at tørvurin á røktarheimsplássum er stórur í høvuðsstaðnum, men ketan hjá Jónu loypir fullkomiliga av, tá hon sigur tað vera "revnandi líkamikið", um tað er land ella kommuna, sum skal veita borgarum eldraøkt og røktarheimspláss.

Hetta er bara ikki so. Hvussu so fegin kommunan vil, so kann hon ikki einvegis taka ábyrgd á einum øki, sum við lóg er lagt til annan myndugleika at taka sær av. Og á eldraøkinum er ein greiður lógarásettur skilnaður.

At kommunan ikki hevur bygt røktarheim, frátekur á ongan hátt landinum ábyrgdina av allari eldrarøktini, herundir at byggja røktarheim ella at veita annað hóskiligt røktartilboð.

Nú er Jóna Mortensen ikki hvør sum helst. Hon hevur politiskar ambitiónir, og tí skuldi mann gingið út frá, at hon skilti, at ein myndugleiki ikki kann vassa inn á ábyrgdarøkið hjá einum øðrum. Slíkt rópast anarki, tað er vónandi ikki tað, ið Jóna Mortensen ynskir.

Harumframt skuldi mann vænta, at hon fylgdi nøkulunda við í almenna tíðindaflutninginum, tá um Boðanesheimið viðvíkur. Tí um hon gjørdi tað, so kendi hon gongdina í málinum og visti, at tilboðini uppá Boðanesheimið í løtuni verða viðgjørd, og at farið verður at byggja í hesum árinum.

Men tað er møguliga ikki tað, sum hevur hennara áhuga.